


# Nøkur sólrík minnir

*Í sambandi við 1000 ára haldi fyri kristniboðanini í Føroyum, hevur Karl E. Andreasen skrivað hesar hugleiðingar*

**Karl E. Andreasen, skrivar:**

Nú fer túsundárahaldið at vera liðugt, og vit hava minst tað, sum hendi fyri túsund árum síðan, tá ið kristindómurin varð boðaður her á landi, hvar okkara forfedrar tóku við kristnari trúgv. Og nú vit eru komin inn í atventina, hvar vit um nakrar fáar dagar skulu minnast ta stórhending fyri 2000 árum síðan, tá ið Jesus frelsari okkara varð føddur niðri í Bethlehem reivaður og lagdur í eina krubbu, tí ikki var rúm fyri honum í herberginum. Til tross fyri, at hann gjørdist okkum eitt stórmenni við at útvinna okkum frelsuverkið á Golgata. Tá var eitt ljós tendrað, so vit menniskjur kundu finna aftur, tí øll vóru vit vilst sum seyðir.

Mítt størsta og fyrsta minni stendur sólklárt fyri mær enn. Tá ið míni kæru trúgvandi og gudsóttandi foreldur, sum royndu at vra trúgv ímóti tí lyfti tey høvdu givið, at vísa okkum børnum á vegin, sum førdi heim til himmals. Eg hugi eisini við gleði til tey sjey árini, sum eg gekk í mín barnaskúla, har eg var fegin um at fáa ein góðan lærara í kristni. Hesin lærari gekk høgt upp í hetta fak, og eg skilti eisini at lærarin og míni foreldur gingu hond í hond inn fyri, at vit skuldu duga tær leksiur, sum vit fingu fyri frá honum. Men tó ikki so at skilja, at hinar leksiurnar ikki eisini skuldu gerast til lítar. Meg minnist eisini tað góða samband, sum var ímillum skúla og kirkju, hvørs bygningar vóru vígdir til Gud Faðir, Guds Son og Guds Heilaga Anda, hvar presturin var kirkjunar hirði í meinigheitini og lærararnir høvdu til uppgávu at læra okkum børnini, tað okkara forfedrar mettu um skúlaverkið, sum jú var forgarðurin inn til halgidómin.

Mær hugar eisini okkara skúlastjóra sita á orgulbeinkinum í kirkjuni til reiðar at spæla, tá ið kirkjuklokkan kimaði til barnadóp, ringdi til gudstænastu sunnu- og halgidarar, kimaði til hjúnarvígslu og ringdi, tá ið sagt varð farvæl fyri seinastu ferð við ein av okkara bygdafólkum.

Hetta tíðarskeiðið var mær víst at fáa tað álit at skaffa luft til orglið. Tað arbeiði var tá kallað at vera traðkari. Enn síggi eg fyri mær stongina, sum ferðaðist upp og niður við teimum trimum merkjunum á, tí hetta arbeiðið skuldi gerast samvitskufult. Sum eg ofta stóð aftan fyri orglið sá eg mangan mín lærara í kristni koma upp á loftið. Hann hevði altíð nakrar sangfuglar við, kvinnur og menn. Tá ið tey byrjaðu at syngja var sálmasangurin væl samansjóðaður, saman við teim mongu, sum sótu niðri í kirkjuni, sum vóru komin at lýða á tað, sum presturin hevði at siga teimum, ella tá ið deknurin las lestur.

Meg minnist við gleði tíðina sum lá fyri framman, tá ið eg skuldi fáa prestsins hond á høvdið, tí eg sum ungur hevði gjørt av at fara til skips og hetta eydnaðist mær eisini at fara avstað sum fimtan ára gamal. Har kom eg at verða ímillum gudsóttandi menn.

Hvørt leygarkvøld á midnátt var reint dekk. Tá var hvílidagur og hildið heilagt. Eftir góða hvíld samlaðust vit sum heima til gudstænastu, har sálmasangur ljóðaði og ein av manningini las lestur. Um kvøldið var møti hildið við innleiðingi og vitnisburði.

Tann almenna hugsanin umborð var, at vit mistu einki, við at halda heilagt og hvíla sunnu- og halgidagar.

Hetta var eisini sett í samband við orðini úr halgubók, hvar tað verður sagt: „Søkið fyrst Guds ríki og rættvísi hansara, so skal alt annað verða givið tykkum".

Eftir at hava verið heima um summarið og lagt fisk upp, so var farið aftur til Grønlands, tá kundu vit á heystardegi koma aftur við fullum skipi, umframt at hava lagt fleiri hundrað skippund upp á land í Grønlandi.

Sum árini gingu og eg gjørdist valbarur, varð eg valdur í kirkjuráðið. Tað var áhugavert at koma saman við teim gomlu, sum allir vístu seg at vera tilkomnir menn, sum løgdu fundin í Guds almáttshond. Tí nú galt tað guddommiligheitina, sum skuldi røðast um. Eg gjørdist ikki sørt bilsin, tá ið teir vístu mær tað álit at gerast formaður í kirkjuráðnum. Eg kom tí at hava tætt samstarv við sóknarprestin og próstin Jákup Dahl. Hesin sami próstur, sum skrivaði søgu í kirkju okkara við at vinna okkum móðurmálinum pláss í kirkjum okkara. Seinni umsetti hann bíbilbók okkara til móðurmálið, sum nú eingin ivi er um, er okkara tjóðarmál.

Tí gjørdist eisini lættari at skilja skriftirnar.

Millum próst og prestin N. J. Rasmussen var sera gott samstarv, tað var tí áhugavert at vera saman við teimum.

Ikki liggur fyri at leggja pennin uttan at nevna tann triðja prestin eftir seinna veraldarbardaga F. Busch hjálparprest. Sum menniskja var hann ein edilingur, og var hann tað ikki minni sum prestur. Ynskiligt var, at hann hevði betri talugávur, men ávísar orsøkir vóru fyri tí, sum eg ikki skal koma inn á, men hann sá eina stóra uppgávu í, sum prestur at virka ímillum okkara ungdóm, sum hann eisini gjørdi trúliga. Hann vitjaði eisini tey gomlu, sjúku og handikappaðu, sum sótu heima og ikki høvdu umstøður at koma í kirkju.

Á sjúkrahúsinum vitjaði hann ofta og títt fyri at bera eina heilsan frá okkara frelsara Jesus Kristus.

Millum hesar omanfyrinevndu Guds tænastumenn var sera gott samstarv.

Tað var eisini orsøkin til, at okkara kirkja sum var bygd í 1866 og útbygd í 1930 árunum. Men kortini var tað mangan hugstoytt at síggja, at mong vóru tey, sum fóru heim vegna plásstrot. Men tá fingu vit tað hugskot at spyrja okkara prestar um at hava tvær Gudstænastur sunnu- og halgidagar, eina fyrrapart og eina seinnapart. Tað gjørdu prestarnir við gleði.

Nevndu prestar vóru eisini trúgvir at koma til møtir í KFUM&K, hóast teir hvørki vóru bidnir at byrjað ella endað møti. Ofta løgdu teir sín vitnisburð av á møtunum. Var bønarmøti boygdu teir knø saman við okkum.

Her kundi mangt annað verið at fest á blað.

Annars vil eg til seinast ynskja føroya fólki eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýttár, við bøn um at Guds Heilagi Andi má fáa gott rásarrúm í kirkju okkara og í øllum trúgvandi samkomum.



Sosialurin mikudagin 5. oktober 1955

# N. J. Rasmussen, prestur, fer úr Klaksvík fríggjadagin

**- aftaná 23 ára starv**

1. apríl 1932 varð hin 23 ára gamli Niels Jensen Rasmussen settur sum prestur í Norðuroya vestara prestagjaldi har hann hevur røkt prestastarv inntil seinasta sunnudag, tað var 2. oktober 1955 - ella sløk 24 ár.

Hetta má sigast at vera trúgv tænasta í sama starvi á sama staði. Hetta hevur heldur einki lættført starv verið. Tað hevur ikki einans verið at leita úr prestagarðinum niðan í Klaksvíkar kirkju, alt annað, tí ikki hevur hann havt minni enn 4 kirkjur (Mikladal, Húsar, Kunoy og Árnafjørð) uttan fyri Klaksvík at røkt. Men bygdirnar í kallinum eru fleiri enn so, og Rasmussen hevur heldur ikki verið óvanligur gestur á Trøllanesi, Syðradali, Haraldssundi, Ánunum og úti á Oyri. Men tíðum hevur kallið verið størri enn so, tí ikki so sjáldan hevur hitt eystara prestagjaldið í Norðoyum ligið í prestaloysi, serliga tá ið prestaskifti hava farið fram. Tá hevur hann eisini røkt kirkjurnar á Viðareiði, Hvannasundi, Svínoy, Kirkju og

Hattarvík. At hann eisini hevur vunnið sær vinir á hesum støðum, skilja vit best av teimum áheitanum, ið komnar eru frá hesum kirkjuliðnum - eisini tey vildu fegin sum so oftani áður komið saman við honum í gudshúsinum, árrenn hann flytur til Danmarkar, men ov knøpp varð tíðin til, at hetta fekst í lag.

Men skilnaðarheilsaninar verða ikki minni hjartaligar og takksamar fyri tað.

Spjaddar liggja Norðoyggjarnar, 6 í tali, og fleiri bygdir á flestu oyggjum. Skal ein ferðast oyggjanna millum, má ein fara um harðastu streymafirðir og verstu landoddar. Tað krevst tí ikki so lítið av manni, ið skal røkja prestastarv í so mongum fjarskotnum bygdum. Men Rasmussen hevur átt allan tann djarvleika og eldhug, ið tørvur er á.

Altíð hevur hann verið til reiðar, og altíð hevur hann gjørt sína skyldu uttan so, at tær máttmiklu natúrkrefturnar hava forða, hvat stundum hendir her á landi.

Tá ið hann fyri stuttum kundi halda silvurbrúdleyp, tóku „fleiri vinir" soleiðis til orða um hann í hesum blaði: „Prestur er – tað er ikki ov nógv sagt – ógvuliga væl dámdur maður. Tað hevur ikki verið so lætt at vera prestur í eini bygd, har stór brøðra-mein-ig-heit er, men hann, við sínum sera fólkaligu gávum hevur dugað avbera væl at umgingist hesa meinigheit, og mong av teimum eru eisini komin at halda av honum. Prestur hevur verið tænari í orðsins rætta týdningi; hann hevur altíð verið villigur til kirkjuligar handlingar – hann hevur ongantíð umborið seg við at sagt: „eg havi ikki tíð í dag, steðga til sunnudagin." Nei, gerandis sum heilagt, morgun ella kvøld, uttan mun hevur hann staðið til reiðar í sínum embæti."

Og í heiminum! Hvat følir ein seg væl at støkka inn á gólvið hjá honum, har er hann húsbóndi við lít, skemtingarsamur og prátingarríkur, ella frúan, við kaffimunninum, jú, so sanniliga er har hugni, har kennir ein seg ikki til „ovurs".

Tað, sum einamest hevur sermerkt Rasmussen, eru hansara frálíku evni at minnast aftur tey fólk, ið hann einaferð hevur hitt. Ikki minst hetta hevur alt fram hitt mikla fólkalyndið, sum hann gjøgnum árini hevur vunnið millum manna. - Rasmussen hevur verið prestur í orðsins rætta týdningi; hann hevur sera góðar gávur sum talari, og uppaftur hin vegin – hann kennur øll síni sóknarbørn og meir afturat, veit at navngeva tey øll, ja kennir enntá børnini av fólkaslagnum. Tað verður ikki bert á prædikustólinum, men eisini á gøtunum og í bygdalívinum, at Rasmussen verður saknaður; tí allastaðni hevur hesin fryntligi maður skapað hugna og virðing um seg. Hansara blídni og menniskjaliga framferð hevur verið so fyrimyndalig, at leingi verður at leita eftir manni, sum í so ríkt mát hevur fingið hesar ríku gávur í kjøtið bornar. Ikki minst hetta verður at halda minnið um hann livandi manna millum.

Lítið hevði borið til at skriva stórvegis um Rasmussen uttan at nevnt konu hansara, Petru; tí neyvan vildi tað verið manni gjørligt at útint dygdargerning uttan ein hollan stuðul í tí hjúnarliga samlívinum. Hollari stuðul kundi hann neyvan havt fingið enn hana, ið staðið hevur við lið hansara gjøgnum hesi mongu yrkis-ár.

Prestur og prestafrúan, sum tey vanliga verða nevnd her í bygdini, eru javngomul; bæði fødd í 1906. Prestur er føddur 24/1-1906 í Suðurjútlandi, bóndasonur; tey vóru 10 systkin, 7 brøður og 3 systrar. Frú Rasmussen er fødd 27/7-1906 í Rituvík, dóttur til skipseigara D. P. Højgaard; eisini tey vóru 10 systkin, 6 brøður og 4 systrar.

Tey eiga 2 dreingir og eina gentu. Rasmussen, prestur, fekk tíðliga hug til bókina. 22. januar 1929 tók hann gudfrøðisprógv, tað vil siga 2 dagar áðrenn hann fylti 23 ár. Hann má hava verið yngsti prestlærdi maður í Danmark.

Sama árið 31/5-1929 kom hann til Havnar at verða prestur. Har var hann so til 1. apríl í 32; tá kom hann til okkara, og hevur sostatt sitið her sum prestur í gott og væl 23 ár. Petra Højgaard er sum áður sagt úr Rituvík, hon hevur verið lærarinna, tók prógv 1926 bert 20 ára gomul – eisini ung lærarinna. Tey giftust 29/5-1930, høvdu silvurbrúdleyp hvítusunnudag í ár.

Prestur hevur havt nógv álitisstørv. 1. apríl 1932 kom hann í skúlanevndina. Hevur sitið har alla tíðina



mest sum formaður. Hann varð ein av høvuðsmonnunum fyri at fáa í lag Klaksvíkar millum- og realskúla; somuleiðis tekniska skúlan.

Tað er eingin ivi um at hann hevur gjørt eitt stórt arbeið fyri skúlan í Klaksvík. Tað kann eisini nevnast, at hann umframt hevur sitið í skúlanevndum bæði fyri Mikladals, Trøllanesar, Húsar, Syðradals, Kunoyar, Haraldsunds og Árnafjarðar skúlar.

Í 1930 var hann við til at stovna barnaheimið í Vestmanna sum nú er flutt til Havnar. Hann hevur sitið í nevndini øll árini, sum formaður í 20 ár. Eisini hevur hann verið við til at fingið í lag tann barnagarð, ið verður verunleiki í Klaksvík.

Tann 1. januar 1935 var prestur við at stovna Færøernes Fortsættelses Sygekasse, alla tíðina hevur hann sitið í hesu nevnd frá 1. januar 1944 sum næstformaður og 1. Januar 1944 bleiv prestur blaðstjóri av Færøernes Kirketidende.

Í hansara prestatíð er eisini kirkjan í Árnafirði bygd og eingin er ivin um, at hann má hava stuðlað til hesa bygging. Hann man óivað hava glett seg saman við árnfirðingum tá ið kirkjan 10. oktober 1937 varð vígd.

Í 1941 vóru bæði tvey við at stovnað KFUM og K her í Klaksvík.

Frá 30. august er hann vorðin settur sum sóknarprestur hjá týska kirkjuliðnum í Haderslev. Hann verður innsettur í starvið 16. oktober. Hann fer einsamallur við „Trondhjem" fríggjadagin. Konan og sonurin ið heima er fara ætlandi við Tjaldrinum tá tað kemur aftur úr Grønlandi.

Eitt talandi dømi um at presthjúnini eru væl umtókt vóru tey 1000 fjarritini, ið tey fingu á silvurbrúdleypsdegnum.

Nú skilnaðarstundin er komin okkum til handa, fara vit at bera fram okkara dýrmettu tøkk fyri hesi ríku og sælu ár, ið tað untist okkum at hava hesi frægu, avhildnu og hábornu prestafólk okkara millum. Ein einsamøll tøkk er so fátækslig, men á hesum sinni fylkjast túsundir norðoyingar í hjartaligari og kenslubornari tøkk, samstundis sum teir við miklari virðing bera fram teirra bestu fagnaðarkvøðu og ynski um góða eydnu og Guds signing í nýggja starvinum.

**Fleiri vinir**

## Kirkjuliðini heilsaðu eisini presti

Á skilnaðarstund Rasmussens prests vil kirkjuliðið í Klaksvík frambera honum sína hjartans tøkk fyri tey ár, Gud unti honum at starvast okkara millum.

Sløk 24 ár eru farin, síðani Rasmussen kom til okkara, og mangt er broytt í hesi ár; men sama gleðiboðskap hevur hann boðað ár eftir ár. Altíð var boðskapurin merktur av kærleika, veking og trúfesti. Hann hevur sostatt staðið sum ein sannur Harrans tænari – altíð fúsur til verka,

Bæði í gleði og sorg.

Prestagerning sín hevur hann røkt so væl, at ringt verður at fáa mann í mans stað, sum menniskja finst valla ein slíkur maður sum Rasmussen, altíð líka við øll, stór og smá. Okkara ynski er nú tygum fara frá okkum, at hin altvaldandi Gud má styrkja tygum, konu tygara og børn og geva tykkum nógv góð arbeiðsár í tí kalli, tygum fara til á heimlandi tygara, so tygum verða til signing fyri tað kirkjulið, tygum koma til - eins væl og tygum hava verið fyri okkara.

Til síðst heilsa vit tygum, harra Rasmussen, frú og børnum við tí gamla føroyska orðinum: Jesus fylgi tykkum.

*Klaksvík, á mikkjalsmessu 1955*
*Fyri kirkjuliðið*
*Karl Andreassen.*

Kirkjuliðið í Mikladals sókn vil á hnda hátt siga okkara kæra presti, N. J. Rasmussen, nú skilnaðarstundin er komin, stóra tøkk fyri ta longu tíð, hann dvaldist her hjá okkum.

Somuleiðis ynskja vit honum alt gott í hansara framtíðar stað.

Hjartaliga verðið tygum, Rasmussen, kona og børn, heilsað við ynskjum um, at Gud má vælsigna tykkum nú og í allari framtíð.

*Í ávikum góður,*
*Altíð fróur,*
*hugar væl;*
*ikki tað grettir,*
*setti ongan eftir.*

*Kirkjuliðsráðið í Mikladali.*

Okkara bestu kvøðu senda vit tygum á skilnaðarstundini.

Mætur maður hevur verið! Prestur av Guðs náði, vinsælur við øll, bæði stór og smá, innan og uttan kirkjudyr.

Vit ynskja, at tygum, kona tygara og børn mega fáa eina eydnuríka framtíð við Guds signing.

*Guds friður og signing á skilnarstund*
*Kunoyar kirkjulið sendir.*
*Í minni okkara verið tú,*
*so leingi Kunoyggin stendur.*
*Kunoy, 30. sept. 1955.*
*Kirkjuliðráð1ið.*

Eina hjartans tøkk veita vit tær, N. J. Rasmussen presti, fyri ta tíð, tú hevur verið her, og fyri ta hjartaligheit og bróðursinni, tú hevur víst móti okkum bæði í sorg og gleði.

Fyri meinigheitina.
*Meinigheitráðsins vegna*
*Johs. Fr. Joensen*
*Húsar.*

Nú Rasmussen prestur er farin frá okkum, loyva vit okkum her at bera honum fram tøkk okkara fyri tey ár, hann arbeiddi her okkara millum.

Um hann kann verða sagt, at hann var ein orðsins tænari í røttum týdningi, og hevði fingið tey evni og tær gávur, sum skuldu til fyri at bera fram orðið.

Meinigheitsráðið og við tí allir íbúgvar í Árnafirði, takka honum fyri trúfastan gerning tey ár, hann arbeiddi her; ikki bert sum prestur, men eisini sum menniskja: blídligur og fryntligur við øll, sum hann kom á tal við, yngri sum eldri.

Saknur verður í tygum. Men, sum orðatakið sigur; maður kemur í manns stað. Latum okkum vóna tað; men vøkkult verður her at fáa eins góðan mann aftur.

Vit ynskja tygum og konu tygara mangar góðar dagar á tí nýggja staði, har tit nú taka bústað, og ynskja, at Harrans signing má fylgja tykkum.

Enn einaferð takk.

*Árnafjørð, 29. sept. 1955*
*Meinigheitsráðið.*